## Mong fingu jólahjálp

Næstan 1.500 íslendskar familjur fingu sokallaða jólahjálp frá teirri serligu hjálpartænastuni nú upp undir jól. Morgunblaðið skrivar, at munandi fleiri familjur fingu hjálp í ár enn í fjør, og at íslendska hjálpartænastan fekk stuðul frá hjálparfelagsskapum í USA, Kanada og Niðurlondum. Hjálpartænastan sigur, at í ár vóru tað serliga nógvar ungar familjur, sum høvdu tørv á hjálp til at halda jól, og at í fleiri førum var talan um yngri fólk, sum høvdu mist arbeiðið. Mong teirra høvdu ongantíð søkt um jólahjálp fyrr.



## Eiga at vera har

Hóast fleiri danskir hermenn eru falnir í krígnum í Afghanistan, eru tað støðugt fleiri danir, sum taka undir við, at Danm,ark hevur hermenn har. Ein kanning, sum Gallup hevur gjørt fyri Berlingske Tidende, vísir, at 50 prosent av teimum spurdu taka undir við, at danskir hermenn eru í Afghanistan. 33 prosent vilja hava hermenninar heim alt fyri eitt. Afghanistan-serfrøðingurin Peter Dahl Thruelsen sigur við blaðið, at hann er ovfarin av, at so nógvir danir taka undir við, at landið hevur hermenn í Afghanistan. Hann heldur hetta vísa, at danir hava vant seg við støðuna.



*Stjórnin í Fiskimannafelagnum telir sjey limir, sum umboða allar sýslurnar í Føroyum*

# Inntøkan hjá fiskimonnum nógv minkað

**- Tað eru framvegis skip, sum geva monnum góðar inntøkur, men miðalinntøkan hjá fiskimonnum er minkað heilt nógv seinastu árini, segði Jan Højgaard á landsfundi í Fiskimannafelagnum í morgun**



*Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, á røðarapallinum í Norðurlandahúsinum í morgun*



*Henrik Old, sum hevur latið seg stilla upp móti sitandi formanni, var eisini á landsfundi í Fiskimannafelagnum í morgun*

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Í dag halda trý feløg, sum umboða fiskimenn og sjófólk, landsfund og aðalfundir í Havn.

Landsfundurin hjá Fiskimannafelagnum er í Norðurlandahúsinum, og aðalfundurin hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag er á Hotel Tórshavn.

Klokkan 15 seinnapartin fóru Føroyskir Fiskimenn Uttanlands á aðalfund í Norðurlandahúsinum.

### Vanaligir prísir

Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, segði á landsfundinum í morgun, at árið 2009 hevur verið merkt av vánaligum fiskaprísum fyri tosk og hýsu, umframt at onnur fiskasløg eisini hava ligið lágt í prísi.

Hann vísti á, at tað serliga er línuflotin, sum hevur kent sviðan av prísfallinum. Í aðrar mátar hevur heimskreppan, sum formaðurin tók til, merkt gongdina hjá øðrum skipabólkum, eitt nú garnaskipum og langfaraskipum.

Jan Højgaard segði, at nótaskipini og ídnaðarskipini hava havt munandi minni svartkjaftakvotu, eins og prísurin fyri makrelin hevur verið fallandi.

- Rækjuflotin hevur selt fyri heldur minni enn árið fyri, men hinvegin hevur oljan verið bíligari.

### Færri sjófólk

Formaðurin vísti á landsfundinum á, at hjá samlaða trolaraflotanum hevur tað gingið rætta vegin, sum hann tók til.

- Tað hevur verið so heppið, at upsaprísurin hevur hildið sær, eins og fiskiskapurin var góður fyrra hálvár í ár.

Jan Højgaard segði, at tað framvegis eru skip, sum geva monnum góðar inntøkur, men miðalinntøkan hjá fiskimonnum er minkað heilt nógv seinastu árini.

- Talið av sjófólki er eisini minkað nógv síðan í nítiárunum, segði formaðurin í Fiskimannafelagnum á landsfundi í morgun.